# Tað er ikki synd í mær

Fyri nøkrum mánaðum síðan gjørdi 23 ára gamla Bodil av at gevast at læra, so hon kundi fara undir at menna tvey ára gamla son sín, Kjartan. Í tímar hvønn einasta dag, stimbrar hon heilaskadda dreingin eftir eini venjingarskrá, ið amerikumaðurin Glenn Doman hevur uppfunnið.

– Í staðin fyri ein gerandisdag í mótloysi og døpurhuga, kunnu vit nú gera nakað ítøkiligt og hava vón um, at sonur okkara fer at mennast, sigur blaðunga mamman



FÓLK Á LEIÐINI
*Orð:Rúna Sivertsen*
*Myndir: Bárður Lydersen*

– Eg havi ikki angrað mína avgerð eitt einasta sekund, sigur 23 ára gamla Bodil Joensen úr Klaksvík.

Í vár segði hon lærupláss sítt frá sær og flutti heim til Føroya fyri at fara undir eina intensiva venjing av heilaskadda soni sínum.

Frá morgni til myrkurs hvønn einasta dag, venur hon dreingin eftir eini skrá, ið er samansett júst til hansara.

Fólk undrast og spyrja, um tað ikki er ógvuliga strævið, men hon sigur, at tað var nógv strævnari at sita passiv og síggja, at drongurin als ikki mentist.

– Eftir at hava vant í 3 mánaðir, síggjast nú smá framstig hjá Kjartani, og tey eru alt stríðið vert, sigur Bodil.

Tyngsta stríðið hjá henni og øllum teimum, sum fáa børn við serligum tørvi, er at stríðast við eina skipan, sum er so stirvin, at sjálvt tann sterkasti má geva upp.

- Men tað er als ikki synd í okkum. Vit hava nú ein innihaldsríkan gerandisdag og hava hvørki tíð at keða okkum ella at stúra, sigur Bodil.

## Ein vónartíð

Tað var miðskeiðis í juni mánaða. Bodil var stutt síðani farin í barnsburðarfarloyvi úr læruplássi sínum í Herlev, har hon las til radiograf.

Nú gekk hon og gleddi seg og legði ætlanir fyri framtíðina, sum sá ljós og góð út.

Hon gleddi seg eisini at sleppa burtur úr hesum ræðuliga hitanum, ið lá yvir Danmark. Tað var alt ov heitt hjá eini barnakonu. Tað skuldi verða gott at koma heim til svalligu Føroyar.

Barnið ætlaði hon at føða heima í Føroyum, og restina av farloyvinum skuldi hon verða heima hjá foreldrum og familju.

Bodil hevði tíðina fyri sær, tí hon var ikki sett at eiga fyrrenn tann 1. august. Ferðaseðilin var keyptur, og ætlanin var at fara heim fyrst í juli.

Men áðrenn hon fór, ætlaði hon sær til frisør. Morgunkápu og inniskógvar skuldi hon eisini hava. At kalla alt er bíligari niðri, so frægast var at keypa sum mest, áðrenn farið varð heim.

Hóast tað var heitt, so var lívið deiligt. Hon hevði bert seg sjálva at hugsa um. Tað var eitt njótilsi at ganga heima og droyma um alt tað, sum hon skuldi gera, bæði fyri og eftir, at barnið var føtt.

Hon fyrireikaði seg til føðingina og barnið og las alt, hon fekk hendur á um føðing og pinkubørn. Men eitt brot í "Bókini um barnið", tímdi hon ikki at lesa. Tað var, har greitt verður frá keisaraskurði og ov tíðliga føddum børnum.

Tað var ikki nakað, ið henni fór at verða fyri. Heldur fór tað at verða so, at hon fór at ganga yvir tíðina, ímyndaði hon sær. Hon skilti heldur ikki, at nakar kundi finna upp á at ynskja sær at føða við keisaraskurði.

Men nú hon gekk heima og hevði so góða tíð, helt hon, at hon kortini skuldi lesa tað, sum stóð um keisaraskurð og børn, sum koma ov tíðliga.

## Vónir vendust til ótta

Bodil hevði tað gott, og barnið føldi hon ikki so nógv til. Í grundini var tað kanska ov friðarligt. Í hvussu er friðarligari enn tað hjá vinkonuni.

Men tað hugsaði hon ikki so nógv um, og hon hevði heldur einki at samanbera við, tí hetta var jú fyrstu ferð hjá henni.

Nú var aftur tíð at fara til kanningar. Jarðarmóðurin lurtaði væl og føldi upp á búkin og spurdi hana, hvussu nógv lív hon føldi. Tá Bodil segði á leið tað, hon helt, bað jarðarmóðurin hana fara heim, drekka eitt glas av køldum vatni og leggja seg niður.

Hetta var nakað, ið sum oftast virkaði og skuldi fingið barnið at rørt seg. Men tað segði tað sama. Barnið rørdi seg, men ikki so nógv, sum ynskiligt var. Tí helt jarðarmóðirin tað vera best at tosa við barnakonulæknan.

Hon fekk tíð hjá læknanum vikuna eftir. Við eitt vóru ljósu dreymarnir býttir um við ótta og stúran.

## Okkurt er galið

Bodil fekk tíð og skuldi møta á ambulatoriinum fyri barnakonur á Herlev sjúkrahúsi.

Um náttina hevði hon sovið illa, tí hon helt, at okkurt helst var galið. Men so hugsaði hon, at tað var tað nokk ikki kortini. Hetta var fyrstu ferð, so hon visti ikki, hvussu tað átti at vera.

Aftur legði hon ætlanir um, hvat hon skuldi gera til reiðar til barnið. Tá morgunin kom, hevði hon als ikki fingið ta hvílu, sum henni tørvaði, og matarlyst hevði hon ongan orsaka av ótta fyri at fara til læknan.

Uttanfyri sjúkrahúsið sóu tey ein mann styðja konu sína, sum hevði verkir. Hygg, segði Bodil við mann sín. Um hálvanannan mánaða verða tað vit.

Á sjúkrahúsinum varð hon kannað. Skannarin vísti, at barnið vigaði bert 1300 gramm. Eftir tíðini skuldi fostrið viga áleið eitt kilo meira. So, her var heilt galið. Bodil varð koyrd í annan skannara, fyri at tey kundu vera vís í, at hetta var rætt, og aftur var úrslitið tað sama.

## Longsti dagur

Hetta var tann 21. juni, og enn vóru fleiri vikur, til Bodil skuldi eiga.

Ein lækni kom og segði: "Tú mást undir keisaraskurð í dag!"



*Í tímar hvønn einasta dag fer lítli Kjartan ígjøgnum eina venjingarskrá, har summar av venjingunum verða gjørdar upp til 30 ferðir*













*Allir sansir hjá Kjartani mugu vekjast, og tí skal hann venja sjón, hoyrn og følisansirnar nógvar ferðir hvønn einasta dag. Pápi Kjartan hevur gjørt honum eina slisku, sum er ætlað at læra hann at grulva. Síðani tey byrjaðu venjingina fyri 2-3 mánaðum síðan, er Kjartan byrjaður at smílast og geva ljóð frá sær. Eisini er hann farin at taka beinini upp undir seg, tá hann liggur á gólvinum*

Á, nei, hugsaði Bodil, og óttin floymdi omanyvir hana. Hon var so bangin fyri barninum. Harumframt ræddist hon so fyri at verða stungin við nál. Men her hjálpti eingin góða mamma; hetta mátti hon ígjøgnum.

Síðani varð hon við sjúkrabili flutt á Ríkissjúkrahúsið, har keisaraskurðurin skuldi gerast. Ein lækni spurdi, um tey ynsktu at bíða til dagin eftir. Men áðrenn tey høvdu tikið støðu, kom hann aftur og segði, at tey tað sama kundu fáa tað yvirstaðið beinanveg.

So var alt gjørt til reiðar til keisaraskurðin. Hon skuldi ikki burturdoyvast og slapp tí at vera við í øllum tí, sum hendi.

Og klokkan 5 seinnapartin henda dagin, kom lítli Kjartan til verðina. Hann vigaði bert 1460 gramm og var 38 sentimetrar langur.

Hesin longsti dagur á árinum, gjørdist eisini longsti dagur í lívinum hjá Bodil.

## Verður ongantíð studentur

Nú byrjaði ein strævin tíð hjá Bodil og manninum. Alt, tey høvdu lagt ætlanir um, varð eftir einum degi kollvelt. Mitt í øllum hesum hurlivasa, skuldu tey gera klárt at flyta, men nú vóru tey læst á sjúkrahúsinum.

Tó, hetta vóru bara praktisk viðurkskifti, sum einki høvdu uppá seg í mun til lítla barnið, sum tey høvdu fingið. Kortini vóru tey noydd at hugsa um tað eisini, og ringt var at fáa tingini at hanga saman.

Tað ringasta var óttin fyri lítla Kjartani. Hvussu fór at verða við honum. Var nú alt, sum tað skuldi?

So við og við gekk upp fyri teimum, at alt var ikki, sum tað átti við dreinginum. Læknarnir sóu okkurt á heilanum, men tað segði teimum ikki so nógv um, hvussu hann fór at mennast.

Einaferð segði ein lækni við tey, at Kjartan fór vist ongantíð at fáa eina studentarútbúgving. Hetta hildu tey vera eitt sera tápiligt úttalilsi, tí so langt fram í tíðina høvdu tey ikki orku at hugsa. Tað segði teimum heldur slett einki um, hvussu drongurin fór at klára seg.

Allar tær óteljandi kanningarnar, ið Kjartan fór ígjøgnum fyri royna at finna orsøkina til heilaskaðan hjá dreinginum, góvu eingi úrlsit. Og enn er ikki staðfest, hvaðani skaðin stavar.

## Ein serstøk gáva

Av tí, at Kjartan var so lítil, kundi Bodil ikki at hava nýfødda sonin hjá sær. Hann var so lítil, at klæðini hjá baby born vóru nóg stór til hansara.

So skjótt, hann var føddur, ballaðu tey hann í eitt teppi, og hon slapp bert at síggja í evarska lítla snýði. Síðani gingu 4 tímar, áðrenn hon aftur slapp at síggja hann.

Heldur ikki slapp hon at hava hann hjá sær á sjúkrastovuni, tí hann mátti liggja í kuvøsu. Hon kundi vera hjá honum so ofta, hon vildi, men tá var hon noydd at sita á einum stóli í eini stovu, har fleiri aðrar kuvøsur vóru.

Á føðigongini, har hon lá, lógu eisini barnakonur við frískum børnum. Tað var hart at síggja tær ganga og trilla vøggurnar aftur og fram.

At fáa eitt barn ov tíðliga, slítur nógv uppá sinnið; kroppurin er jú ikki fyrireikaður til føðingina. Hóast gleðin um barnið er stór, er so nógv annað, sum ikki ber til at seta orð á, ið er svárt at koma ígjøgnum.

Hóast Bodil ikki er uppvaksin við, at Gud revsar, so kom tankin tó sníkjandi við hvørt. Men tað kundi ikki passa, at hennara lítli sonur skuldi revsast fyri nakað, ið hon hevði gjørt.

Tað var ein troyst at koma í Kristnastovu at vera saman við góðum vinum har. Hon var framvegis glað um tað, sum Jesus hevði gjørt fyri hana. Men tá tey sungu lovsangir, kom ein kensla fram í henni, sum gjørdi hana kløkka. Tað kendist sum ein lítil mótvilji í hjartanum at takka beint nú.

Men so við og við lektust hesi sár, og hóast tað var ringt at góðtaka, eru Bodil og maðurin sannførd um, at Kjartan er ein gáva og ein serstøk uppgáva til teirra.

## Vón fyri framman

Einaferð mátti gerandisdagurin byrja, og Bodil fór aftur til arbeiðis.

Men lítli Kjartan mentist ikki og gjørdi als eingi framstig.

Tá ein tíð var farin, fekk hann pláss á einum serbarnagarði, men heldur ikki har mentisi hann nakað.

Vermóðir hennara hevði á internetinum lisið um eina venjingarskrá fyri børn við heilaskaða. Hetta er ein intensiv skrá, ið krevur, at annað av foreldrunum átekur sær at venja við barninum frá morgni til myrkurs hvønn einasta dag.

Tá hon fyrst hoyrdi um hesa venjing, orkaði hon ikki at hugsa um nakað slíkt. Men tíðin gekk, og tá drongurin var vorðin hálvtannað ára gamal, var hann framvegis á sama støði sum tann dagin, hann varð føddur.

Tá tók hon avgerð um, at nú fór hon at royna hesa venjing - og so mátti bera ella bresta.